## Ongar venjingar

Hóast brandmeistarin í Havn, Kartni Jacobsen, aðrastaðnis á síðuni vil verða við, at sløkkiliðið hevur okkurt um tvær árligar felagsvenjingar fyri sínum froskmonnum, so er hetta ósatt sambært froskmonnunum sjálvum.

Sosialurin hevur tosað við fleiri av froskmonnunum, og teir seg einki kenna til nakrar venjingar.

- Eg havi arbeitt sum sløkkiliðsmaður og froskmaður í fleiri ár, og eg havi enn ongantíð verið við til nakra froskmannavenjing, sigur ein teirra. Tað sama sigur ein annar, sum tó sigur seg hava hoyrt um eina venjing, har helmingurin av monnunum vóru á sjónum, meðan hin helvtin bara stóð og hugdi at.

**tn**

Kartni Jacobsen, brandmeistari:

# – Vit skulu ikki kava eftir fólki

**Brandmeistarin í Havn, Kartni Jacobsen, sigur, at teir hava ikki skyldu til at kava eftir fólki, sum eru farin á sjógv**



*Kartni Jacbosen, brandmeistari, sigur, at sløkkiliðið hevur bæði útgerð og fólk til at kava eftir persónum, sum eru farnir á sjógv. Men sløkkiliðið hevur ikki ábyrgdina av hesum og kann tí ikki lastast fyri nakað, sum møguligani gongur galið.*

*Savnsmynd*

BJARGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

- Eg veit væl, at tað kanska ljóðar eitt sindur løgið, men okkara tilbúgving hevur einki við kaving at gera sum so. Tann parturin av bjarging í sambandi við ólukkur, liggur eitt sindur leysur, men tað er so ikki okkara skylda, sigur Kartni Jacobsen.

### Hava útgerð

Kartni Jacobsen sigur, at hóast sløkkiliðið ikki hevur skyldu til at kava eftir fólki, so verður tað gjørt, men um nakað skuldi hent, so kann sløkkiliðið ikki lastast fyri tað, tí tað er ikki teirra ábyrgd.

- Vit hava fólk, ið hava kavaraútbúgving. Vit hava altíð nøkur kavarasett standandi klár, um tørvur er á tí, og tað kemur so at siga ikki fyri, at ikki onkur froskmaður er á vaktarlistanum, sigur brandmeistarin.

Um so er, at eingin froskmaður er á vakt hjá sløkkiliðnum, ger tað fyri so vítt heldur einki, tá ið tað ikki er ábyrgdin hjá sløkkiliðnum at kava eftir fólki, sum eru í neyð.

Brandmeistarin sigur, at fólkið hjá teimum er væl útbúgvið, og at um so er, at fólk er í neyð, so kava teir sjálvsagt eftir teimum.

### Ábyrgdin kostar

Tað er ivaleyst tað mest náttúrliga, at sløkkiliðini fáa ábyrgd av hava tilbúgving av froskmonnum, men hetta kostar pengar.

Kartni Jacobsen sigur, at skal sløkkiliðið í Havn hava ábyrgdina, so krevur tað pengar til meiri útbúgving, útgerð og annað.

Sambært Kartna Jacobsen er útgerðin hjá sløkkiliðnum í lagi, hóast tað eftir bjargingina av einum bili av havsins botni á havnarvág leygardagin ljóðaði, at hon als ikki var tað.

- Útgerðin hjá okkum er í lagi, tað er eingin ivi um tað. Onkur av froskmonnunum hjá okkum dámar kanska betur sína egnu útgerð, og teir eru kanska ikki so vanir við okkara útgerð. Men okkara útgerð er í lagi, sigur brand-meistarin.

Somuleiðis sigur Kartni Jacobsen, at froskmenninir av og á hava felagsvenjingar, hóast tær kanska ikki eru so nógvar í tali.

- Vit hava fleiri smáar uppgávur, ið virka sum eitt slag av venjingum fyri froskmenninar hjá okkum. Um vit hyggja burt frá teimum, so hava vit helst einar tvær fyriskipaðar venjingar árliga, sigur Kartni Jacobsen.

# Eitt álvarsmál

**Stjórin á Brunaumsjón Landsins, Petur Lava Olsen, váttar, at ongin hevur ábyrgd av at hava kavaratilbúgving**

TILBÚGVING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Petur Lava Olsen sigur, at tað er ikki álagt nøkrum í Føroyum at hava kavaratilbúgving, sum er neyðug, tá ið til dømis ein bilur við fólki fer á sjógv.

### Kommunan ger tað sjálvboðið

Sambært stjóranum hjá brunaumsjónini er tað ikki álagt kommununum at taka sær av hesum, og um kommunurnar gera tað, so er tað sjálvboðið, sigur hann.

- Um nakar skal hava kavaratilbúgving, so krevur tað bæði pengar, útgerð og ikki minst útbúgving. Kavararnir, ið arbeiða hjá sløkkiliðnum í Havn, hava fyrst og fremst frítíðarkavaraskeið, og tað er ikki altíð nøktandi í sambandi við bjarging, sigur Petur Lava Olsen.

Hann vísir á, at við einum frítíðarkavaraskeiði hevur tú loyvi til at kava niður á eina ávísa dýpd, men tað er mangan í sambandi við bjarging í Føroyum, at tú noyðist væl niður um hesa dýpd.

- Tú skalt eisini hugsa um, hvat tað er, ið tú útsetur kavararnar fyri, tí tað er ikki so lítið, sigur Petur Lava Olsen.

Sløkkiliðið í Keypmannahavn sjálvt gjørt tilbúgving

Stjórin á Brunaumsjón Landsins sigur, at í Danmark hevur Københavns Brandvæsen sjálvt tikið stig til at gera eina kavaratilbúgving, og teir hava tí eisini átikið sær ábyrgdina av hesi tilbúgving.

- Í Keypmannahavn hava tey gjørt tilbúgvingina, og so hava tey eisini sjálvi sett nøkur krøv til útbúgving, ið froskmenninir skulu hava, sigur Petur Lava Olsen, sum heldur talan verða um eitt álvarsmál, ið eigur at verða loyst so skjótt sum gjørligt.



*Petur Lava Olsen, stjóri á Brunaumsjón Landsins, váttar, at tað ikki er álagt nøkrum í Føroyum at hava kavaratilbúgving, og tí kunnu í veruleikanum øll bara standa og hyggja at, um ein bilur fullur av fólki fer á sjógv, tí eingin hevur ábyrgd av at bjarga fólkunum.*

*savnsmynd*

## Landsstýrismaðurin ikki at hitta

Tað er Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, ið hevur evstu ábyrgd av allari tilbúgving í Føroyum.

Vit royndu fyrrapartin mánadagin at fáa fatur á landsstýrismanninum, men hann var á landsstýrisfundi og var tí ikki at hitta, fyrr enn farið var um evstamark hjá blaðnum.

**tn**